Sí›sti dansurin

Hóast t‡dningarleysur, so var› talan sunnudagin um ein hampuliga væl spæland dyst millum Herfølge og FCK, men uppger›in kundi helst veri› meira spennandi

Heldur ikki hesu fer› eydna›ist ta› Toda Johnsson at fáa bóltin í meskanar hjá Jákupi Mikkelsen

Jákup Mrøk/

Álvur Haraldsen

Nógv var› gjørt burturúr, tá Herfølge sunnudagin tók móti FCK, í einum dysti, har lítla bygarli›i› bert skuldi taka sær av løttum, me›an ásko›ararnir kundu fagna li›num, sum stutt fyri hev›i vunni› fyrsta DM-heiti› í søgu felagsins.

Sjálvandi var ein sigur eisini ynskiligur hendan dagin, men var› tosa› vi› ásko›ararnar, so var hetta tó als ikki ta›, sum hev›i mestan t‡dning. Nei, ta› t‡dningarmesta var at rópa á leikararnar, og longu me›an dansigenturnar vóru á vøllinum, byrja›i manskóri› á endatribununi at rópa á leikararnar.

Ta› var eisini greitt, tá dysturin byrja›i, at nógv var› rigga› til, til tess at hei›ra spælarunum. Me›an FCK spælararnir eins og vanligt komu ni›an á mi›juna, komu Herfølge leikararnir út gjøgnum hei›ursport.

FCK Betri

Á odda fyri leikarunum gekk føroyski landsli›smálverjin, Jákup Mikkelsen, og ta› gekk heldur ikki long tí›, á›enn hann longu hev›i fingi› okkurt at takast vi›. Todi Jónsson drógv frá mi›juni vi› bóltinum, og ta› var eisini um reppi›, at hann fekk skot á.

Vi› møguleikum gekk so hampuliga javnt á, men ta› tóktist tó vera greitt, at FCK hev›i leikliga yvirvág. Tí var ta› kanska ikki heilt óvænta›, at Mads Westh kundi leggja gestirnar á odda, eftir at bólturin var› sendir innfyri úr vinstru.

Undan hesum hev›i Jákup í fleiri førum víst, hví hann ver›ur mettur milllum fremstu málverjarnar í landinum, men í málinum sjálvum var hann púra ósekur. Ta› einu fer›ina var tó um reppi›, at hann var fullkomuliga sn‡ttur. Ein sending ni›an móti FCK málinum gjørdist alt ov lang, men me›an Jákup vinka›i, at hann átti bóltin, og lat hann fara til málspark, fóru bótlurin beint á steingina, á›renn hann aftur fór út í spæli›.

Naka› eftir lei›slumáli› lá bólturin aftur í Herfølge málinum. Todi vann luftdyst móti landsmanni sínum, og vi› høvdinum fekk hann beint bóltin móti málinum, har Zuma gav seinasta skumpi› inn um strikuna, men ta› ´siti seg tó, at linjuverjin flagga›i fyri rangstø›u, tá Zuma setti fótin á.

Sostatt var bert hitt eina máli›, tá fari› var› til hálvleiks, og eftir b‡tinum atv spælinum, so var ta› iki heilt av lei›, at gestirnir vóru á odda, tá fari› var› til hálvleiks.

Jákup framvi›

Venjarin hjá FCK, Kim Brink, hev›i í hálvleikinum tiki› Toda Jónsson út, eftir at hesin í fyrra hálvleiki hev›i veri› sera líti› sjónligur.

Vi› hesum broyttist uppstillingin til 4-4-2, og var li›i› hjá FCK nú naka› aftarligari á vøllinum.

Saman vi› øktum tr‡sti frá Herfølge leikarunum vi›førdi hetta, at spæli› var› tr‡st alsamt meira oman móti málinum hjá gestunum, sum nú stó› beint framman fyri mest trúføstu ásko›ararnar.

Fleiri fer›ir var um reppi› at Herfølge skora›i, og ta einu fer›ina var› bólturin eisini sparka›ur burtur á mállinjuni.

Hóast FCK sostatt royndi at halda fast um sigurin, so merkir hetta ikki, at teir vóru vandaleysir í hinum endanum.

Ta einu fer›ina var um reppi›, at Harald Brattbakk slapp leysur, men vi› eini frálíkari glí›andi takling eydna›ist Steven Lüstü at vinna bóltin aftur, eftir at nor›ma›urin hev›i drigi› framvi› Jákupi Mikkelsen.

Yvirhøvur var Lüstü ein av bestu monnunum hjá heimali›num, og ta› var eisini uppibori›, tá hann móti endanum javna›i lei›sluna hjá gestunum, solei›is at ásko›arar felagsins aftur høvdu naka› at syngja um.

Máli› kom eftir hornaspark, har Jákup eisini hev›i ditta› sær framvi›. Málverjin gjørdist tó akkurát ov stuttur eftir bóltinum, sum Lüstü ísta›in fekk beint í máli›.

Frøin var nú sjálvsagt øgilig hjá ásko›arunum, og ta› var eisini um reppi›, at talan gjørdist um JHerfølge sigur, men í a›rur fer› teir royndu seg, fekk Karem Zasa í málinum vart fyri royndini vi› høvdinum.

Løtu seinni var dysturin lokin, og so kundu spælararnir endiliga sleppa gle›ini á flog. Hálsfevnandi runnu teir kring vøllin, har teir tó góvu sær gó›ar stundir at siga øllum farvæl.

Eftir hetta vór›u steyp og medaljur lætnar leikarunum, og so galt um at fara innar í brúsu, at gera seg til rei›ar til stóru gullveitsluna, sum skuldi ver›a seinni um kvøldi›.

Vinmenninir Jákup og Todi heilsast á›renn dystin sunnudagin

Tveittur í hylin

Jákup Mikkelsen var sjálvandi ovurfegin, nú ta› eydna›ist Herfølge at vinna danska meistaraheiti› í fótbólti fyri fyrstu fer›

Jákup Mørk/

Álvur Haraldsen

Sum kunnugt, so hevur Jákup Mikkelsen vi› DM sigrinum skriva› eitt petti av føroyskari fótbóltssøgu. Hann er nevnliga fyrsti føroyingurin, sum ver›ur danskur meistari í fremstu donsku rø›ini. Eitt bragd, sum gjørdist veruleiki, eftir at Herfølged fyri viku sí›ani megna›i at spæla javnt í Silkeborg, samstundis um Brøndby á útivølli mátti lúta fyri AB.

Fingu gongd á

Fyri einumj 4 – 5 vikum sí›ani, sá tó alt anna› enn bjart út fyri vónirnar hjá Jákupi og teimum um at vinna DM.

Eftir at teir høvdu veri› á odda so at siga alt ári›, kundi Brøndby tá taka fremsta sessin yvir, vi› sigri á júst Herfølge. Dysturin ta fer›ina enda›i heili 5-0 til Breøndby, og so rokna›u tey flestu helst vi›, at hatta var so ta›, men teir í Herfølge góvust kortini ikki.

Jákup grei›ir frá, at teir kanska høvdu ein lítlan ni›urtúr um hetta mundi›, men skjótt gekk kortini, til rættlag kom aftur.

Efti stórtapi› fyri Brøndby vann li›i› einar tríggjar dystir á ra›, saman vi› hinum úrslitunum var hetta nóg miki›, til at Herfølge aftur kundi vinna fremsta sessin aftur, og sí›ani hava teir hildi› fast um hann.

Jákup veit ikki sjálvir, júst hví teir aftur fingu gongd á aftur. – Vit vóru í hvussu so er fyrireika›ir uppá, at ta› kundi ikki bara ganga gott alla tí›ina, og kanska hevur hetta, saman vi› samanhaldinum gjørt sítt til, at li›i› reistist somiki› skjótt aftur, helt Jákup eftir dystin.

Gott at javna

Um júst li›ugt spælda dystin helt Jákup, at ta› var gle›iligt, at teir megna›u at javna móti endanum, tí hóast lagi› á ásko›arunum var gott alla tí›ina, so hev›i ta› veri› harmiligt at skula enda kappingarári› vi› einum tapi á heimavølli.

- At ta› so skuldi ver›a Lüstü, sum skora›i, gjørdi bara alt enn stuttligari, tí hann hevur veri› millum bestu leikarar okkara í so at siga hvørjum dysti, sigur Jákup, og heilt skeivur fór hann neyvan í hesum. Seinni á kvøldinum var› nevnliga bo›a› frá, at málskjúttin var› kosin ársins leikari hjá Herfølge fyri kappingarári›.

Um dystin sjálvan seg›i Jákup, at teir bara royndu at hugna sær. - Tá vit møttu til spælarafund undan dystinum, hev›i Faxe bert skriva 11 nøvn á talvuni, og so ba› hann okkum bara fara út at njóta hesa upplivingina, og ta› gjørdu vit so. Ta› er jú ikki hvønn dag, at tú kanst spæla uttan at hugsa naka› sum helst um, hvørjar avlei›ingar úrsliti› av dystinum hevur.

Sammeta DM heiti› vi› FM heiti›, sum Jákup var vi› til at vinna í 1991, helt málverjin seg tó ikki kunna gera.

- Ta fer›ina lógu kanska meira kenslur aftanfyri, men hetta, sum vit nú hava uppnátt her ni›ri, er sjálvandi eisini naka› heilt serligt, men eg dugi ikki rættuliga at grei›a frá muninum ímillum hesi.

Hvussu var og ikki vi› hesum, tóktist tó kanska naka› óvi›komandi hendan sunnudagin. Ta› sum lá fremst í hugaheiminum hjá málverjanum var sjálvsagt meistaraheiti›, sum hann júst hev›i veri› vi› til at vunni›. Saman vi› li›feløgunum var› runni› einar tvær fer›ir runt vøllin at takka ásko›arunum. Eftir hetta var› fari› inn í skiftirúmi›, har lagi› eisin var av tí allarbesta.

Sum sæst her á sí›unum, so var ein partur av skemtinum at tveita leikarar og lei›arar í lítla svimjihylin, sum er í skiftingarrúminum, og føroyski leikarin slapp so heldur ikki undan at kava ni›ur.

Hetta oy›ileg›i tó ikki gle›ina. Herfølge er danskur meistari, og fyrst og fremst snúi sunnudagurin seg um hetta.



Aftaná dystin bleiv Jákup bleiv tveittur í hylin, vi› gullmedaljunum um hálsin